


Bókabólkur verður í februar mánaði. Vit lesa bókina Den kær-lighed som sætter fri (Redeeming Love) eftir Francine Rivers. Bókin er sera spennandi at lesa, og hon fæst í Logos Bókahandlinum



Mikukvøldið 11. januar kl. 20 fáa vit vitjan av Dorit og Simon Marshall. Dorit er uppvaksin á Vatnsoyrum, meðan Simon er breti. Tey fara at siga frá um tað arbeiði, tey nú fara í, sum leiðarar á GLO-bíbliuskúlanum í Motherwell í Skotlandi (hetta er tann bíbliuskúlin, sum m.a. Ruth og Thorvald hava gingið á, og Unn og Jógvan Zachariassen hava verið leiðarar á). Simon fer eisini at hava eitt orð til okkara.

**Bønarevnir:**

**At biðja fyri Teiti og hansara familju. Jórun skrivar:**
Vit høvdu eitt hugnaligt jólaaftanskvøld við dunnu, enskum karamellum, rís á la mande og pakkum, akkurát sum tað plagar at vera, so deiliga kent. So hóast vit eru her í Danmark, so kendist tað ikki so. Vit hava internetradio, so vit hoyra Útvarp Føroya og hinar rásirnar eins væl og í Føroyum, so sjálvt bakgrundsljóðið gjøgnum dagin var tað góða kenda og deiligt at hava alla familjuna samlaða á jólum. Teitur fekk ta jólagávuna at sleppa oman til okkum at gista jólaaftan - fyrstu ferð síðani 24. oktober - bara tað var praktfult. Tað hevði so við sær, at teir máttu niðan aftur 1. jóladag kl. 11 at vera nakrar tímar og bunkra heilivág.  -  Nú hava vit skjótt verið her í 1 ár og okkum tørvar enn nógva forbøn.  -  Takk fyri at tit biðja fyri okkum.
**At biðja fyri Karis,** at vend skal koma í, so hon kann fáa tað betur.
**At biðja fyri Páll,** serlga í sambandi við nýggja leguhúsiðí Suður-Grønlandi
**At biðja fyri Mari, Janus og børnunum**, nú tey vænta sær eitt barn afturat fyrst í januar mánaði
**At biðja fyri Ceciliu,** nú hon er farin yvir til Qaqortoq at hjálpa til við børnunum
**At biðja fyri Jórun og Kalla,** sum virka millum sigoynararnar í Serbia.
**At biðja fyri Benny og Esther,** nú Benny er vorðin sjúkur
**At biðja fyri ungdóminum  -** at Harrin skal varðveita tey.
**At biðja fyri teimum sjúku og veiku í samkomuni og teimum, ið ikki hava tað so gott og**
**At biðja fyri hvør øðrum.og fyri teimum tiltøkum, sum eru í Hebron**

***BØN -  ER LYKILIN TIL SIGNING  -  BØN -  ER JARÐARRÍKIS STØRSTA MAKT***

**Ábyrgd av húsinum í januar mánaði:**
**Hjørdis & Erling, Marjun & Høgni, Allan & Katrin**

**Kontonr. hjá HEBRON**
Bank Nordic: 6460-9847040
Eik: 9181-4381124

**Hygg inn á**
**www.hebron.fo**

Januar 2012

# HEBRON Á ARGJUM

- kunning, tíðindi og  møtiskrá




Bestu ynski um eitt av Harranum  vælsignað nýggjár.

Hjartaliga vælkomin í HEBRON á Argjum!

## Januar 2012

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Sunnudagur** | 1. | | Nýggjársdag - Einki møti í Hebron<br>Eingin sunnudagsskúli |
| **Mikudagur** | 4. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur. Allar gentur og kvinnur eru vælkomnar. |
| | | Kl. 20:00 | Húsbólkar og tí einki møti í Hebron. Sí á mótsættu síðu, hvar húsbólkarnir vera |
| **Sunnudagur** | 8. | Kl. 10:00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansins |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli - innsavning til barnaheimið Shanti |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Páll Poulsen talar<br>Møtileiðsla: Sverri og Mona<br>Teldan: Sigrid<br>Barnaansing: Jóngerð og Rúni<br>Drekka: Anna og Eydna |
| | | Kl. 19:00 | Ungdómsløta hjá Jón, Rúna og Annu Mariu Steintún—Firm Foundation |
| **Týsdagin** | 10. | Kl. 19:00 | Squash. Bíbliuløta fyri ung í 5.—8. flokki |
| **Mikudagur** | 11. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur. Allar gentur og kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 20:00 | Bíbliutími og bønarløta. Dorit og Simon Marshall fara at siga frá um arbeiðið, tey nú fara í, sum leiðarar á GLO bíbliuskúlanum í Skotlandi. |
| **Leygardagin** | 14. | Kl. 19:00 | Nýggjársveitsla fyri vaksin. |
| **Sunnudagur** | 15. | Kl. 10:00 | Bønarløta |
| | | Kl. 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | Kl. 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | Kl. 12:00 | Møti. Jógvan Jacobsen talar um Efesusbrævið.<br>Møtileiðsla: Djóni og Vónbjørt<br>Teldan: Rúni<br>Barnaansing: Mai og Marni, Valbjørt og Hanus<br>Drekka: Poula og May-Britt |
| | | Kl. 19:00 | Ungdómsløta hjá Lindu, Esbern og Marius. Tey ungu skipa fyri. |
| **Mikudagur** | 18. | Kl. 10:00 | Bønarløta fyri kvinnur. Allar gentur og kvinnur eru vælkomnar |
| | | Kl. 17:30 | Familjudøgverði og bønarløta |

## Januar 2012

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Sunnudagur** | 22. | 10:00 | Bønarløta |
| | | 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | 12:00 | Møti. Djóni Thomassen talar um Heilaga Andan<br>Møtileiðsla: Erling og Hjørdis<br>Teldan: Sigrid<br>Barnaansing: Joan og Eiler, Heidi og Jákup<br>Drekka: Bjørg og Ruth |
| | | 19:00 | Ungdómsløta hjá Sigrid - Firm Foundation |
| **Týsdagur** | 24. | 19:00 | Squash. Bíbliuløta fyri 5.—8. flokk |
| **Mikudagur** | 25. | 10:00 | Bønarløta har allar kvinnur og gentur eru vælkomnar |
| | | 20:00 | Jógvan Jacobsen talar um Rómbrævið |
| **Sunnudagur** | 29. | | |
| | | 10:00 | Bønarløta |
| | | 10:30 | Morgunmøti og barnaansing |
| | | 12:00 | Sunnudagsskúli |
| | | 12:00 | Møti. Jógvan Jacobsen talar um Efesusbrævið.<br>Møtileiðsla: Thorvald og Ruth<br>Teldan: Rúni<br>Barnaansing: Marianna og Bjarni, Heidi og Noomi<br>Drekka: Ása Ósá og Mona |
| | | 19:00 | Ungdómsløta hjá Sigrid - Tgey ungu skipa fyri |
| **Mikudagur** | 1. | 10:00 | Bønarløta har allar kvinnur og gentur eru vælkomnar. |
| | | 20:00 | Húsbólkar og tí einki møti í Hebron. |

**Nýggjársveitslan fyri vaksin verður í Hebron**
leygardagin 14. januar kl. 19:00.
Ábyrgd: Jóngerð & Rúni, May-Britt & Dánjal Jacob, Anna Sofía & Elmar

**Húsbólkarnir møtast hjá hesum:**

Bólkurin hjá Ruth og Thorvald: hjá Bjørg, Faksagøta 8, 100 Tórshavn
Bólkurin hjá Jóngerð og Rúna: hjá Hjørdis og Erling, Argjavegur 49B, Argir
Bólkurin hjá Monu og Sverra: hjá ?? Vit senda SMS
Bólkurin hjá Ceciliu og Jonhard: hjá Solveig og Jákup Andreas, Heiðatúnm 7, Argir

**Hebronlegan á Zarepta verður vónandi í mars mánaði, men vit hava ikki enn fingið endaligt svar um, nær hon verður. Vit hoyra nærri!**